Kommunufelagið

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Dagfesting
9. september 2024

Okkara j.nr.
24/07275-1

Málsviðgeri
Hans Kári Vang

Tygara j.nr.

# Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgaranum

Talan er um nýggja lóg, sum avloysir núverandi lóg um kommunulæknaskipan, men sum í vavi umfatar væl meira enn bara kommunulæknaskipanina. Uppskotið hevur sum endamál at økja og betra um útboðið av heilsutænastum kring alt landið, og talan er tí um eitt uppskot, sum kommunurnar hava sæð fram til í fleiri ár.

Arbeitt hevur verið við lógaruppskotinum í nógv ár, líka síðan sjúkrakassarnir fóru í søguna í 2010. Uppskot hava verið í hoyring fyrr, men tey hava ikki borið á mál. Lógin hevur verið alt ov leingi ávegis, og vónandi verður hon nú umsíðir samtykt.

## Fyrimyndarligur arbeiðsháttur hjá landsstýriskvinnuni

Kommunufelagið er av teirri áskoðan, at er talan um lóggávu, har kommunurnar eiga ein týðandi fyrisitingarligan ella fíggjarligan leiklut, so eiga kommunurnar at vera við í tilgongdini frá byrjan. Í slíkum málum eiga kommunurnar ikki at verða viðgjørdar eins og ein vanligur hoyringarpartur. Ein slíkur arbeiðsháttur tryggjar størri dygd og skynsamari rakstur.

Hesin arbeiðsháttur er tíverri ikki serliga vanligur. Alt ov ofta kemur fyri, at uppskot, har kommunurnar eiga týðandi leiklut, koma til hoyringar við stuttari freist, og uttan at kommunurnar hava verið við í tilgongdini.

Heilsumálaráðið og landsstýriskvinnan eiga tí rós uppiborið fyri tilgongdina í sambandi við lógaruppskotið. Kommunurnar hava frá byrjan kent seg virdar sum partur í málinum. Kommunurnar hava verið støðugt kunnaðar, so hvørt sum lógaruppskotið er smíðað og hava havt høvi til at gera viðmerkingar í allari tilgongdini.

**Hølisviðurskifti**
Undanfarin uppskot hava lagt upp til, at landið skal yvirtaka øll kommunulæknahølir í landinum, men við hesum uppskotinum er henda ætlanin slept. Við uppskotinum verða tað framvegis kommunurnar, ið skulu útvega hølir. Nú ikki bara til kommunulækna og heilsufrøðingar, men til øll heilsustarvsfólk.

Hølisspurningurin er ivaleyst høvuðsorsøkin til, at tað hevur tikið so nógv ár at avgreiða málið, tí fíggjarliga uppgerðin millum landið og kommunurnar í sambandi við, at landið skuldi yvirtaka øll hølir, vísti seg skjótt at verða ómetaliga trupul at fremja í verki. Kommunufelagið fegnast tí um, at henda ætlanin nú er slept.

Sambært álitinum frá 2010 skuldu kommunurnar ongan leiklut hava yvirhøvur. Tær skuldu hvørki veita hølir til viðtalur, tól til viðtalur, ella bústað til avloysarar. Kommunurnar hava tí seinastu 14 árini bara bíðað eftir, at tær fóru at missa hesar skyldur. Tað skerst ikki burtur, at útlitini til at missa egin hølir, hevur ávirkað nógvar av teimum avgerðum, ið kommunurnar hava tikið seinastu 14 árini. Var henda avgerðin tikin fyrr, høvdu kommunurnar ivaleyst havt raðfest økið øðrvísi. Eisini høvdu kommunurnar í størri mun valt at bygt hóskandi hølir í staðin fyri at leiga. Tí er tað átaluvert, at henda avgerðin hevur tikið so langa tíð. Men gott fyri allar partar, um avgerðin nú endaliga verður staðfest við løgtingslóg.

At tær lokalu kommunurnar standa fyri hølisviðurskiftunum er ivaleyst eisini ein nógv betri loysn sum frá líður. At lata ein landsstovn standa fyri at byggja, útbyggja og viðlíkahalda eitt stórt tal av hølum kring alt landið umframt útvega bústað til avloysarar, er helst ikki serliga skynsamt. Eisini má ásannast, at tað mangan er sera trongligt á íløguætlanini hjá landinum, serliga tá tað kemur til útbyggingar og viðlíkahald.

**Bústað til avloysarar**
Eftir uppskotinum koma kommunurnar framvegis at hava skyldu til at útvega ókeypis bústað til kommunulæknaavloysarar. Men skyldan verður nú neyvari ásett. Nú er ásett, at tað bara er galdandi í teimum førum, har tað ikki verður mett gjørligt hjá avloysaranum at røkja starvið frá egnum bústaði. Henda nágreining hevur verið neyðug, og henni taka kommunurnar undir við.

**Heilsuøkir**
Síðan ætlanin um heilsudeplar av fyrstan tíð var gjørd, er tann týðandi broytingin hend, at eldraøkið er flutt til kommunurnar. Við eldraøkinum fylgdi eisini tann samlaða heimasjúkrarøktarskipanin, og harumframt eisini tann parturin av endur- og viðlíkahalds-venjingini, ið er ætlað fólkapensjónistum. Í hesum sambandi varð landið skipað í 8 eldraøkir við hvør sínari sjálvstøðugari heilsutænastu.

Uppskotið býtir nú landið upp í sonevnd heilsuøkir. Men lógaruppskotið ásetir ikki, hvørji økini eru, heldur ikki, hvussu økini verða skipað landafrøðiliga, og ei heldur, hvussu nógv økir talan verður um. Tað verður landsstýrisfólkið í heilsumálum, ið fær fulla heimild at áseta heilsuøkini uttan um Løgting og kommunustýrir.

At skiftandi landsstýrisfólk til eina hvørja tíð kunnu skipa og umskipa heilsuøkini eftir egnari hugsan, metir Kommunufelagið ikki vera í lagi, tí tað skapar ov stóra óvissu. Við uppskotinum fara kommunurnar framvegis at hava ein rættiliga stóran leiklut, og fyri at tryggja støðugar karmar er best fyri allar partar, um heilsuøkini verða ásett beinleiðis í løgtingslógini. Uttan støðugar karmar og harvið vissu fyri, at virksemi heldur fram í langa tíð, verður hugurin minni til at byggja og útbyggja heilsumiðstøðir kring landið.

Viðvíkjandi heilsuøkjum ger Kommunufelagið vart við, at nýggju heilsuøkini mugu skipast við fyriliti fyri teimum kommunalu samstørvum, sum longu finnast í dag. Umframt tey 8 eldraøkini er landið í dag eisini skipað í 8 barnaverndarøkir við neyvt sama landafrøðiliga uppbýti, sum á eldraøkinum. Hetta er sostatt tað býtið, sum so at siga alt kommunalt samstarv í dag er skipað í. Innanfyri hesi 8 økini verður longu í dag samstarvað um nógvar túsund fermetrar av hølum. Umráðandi er tí at hava hesi samstørv í huga, tá ið mørkini á komandi heilsuøkjum skulu ásetast.

**Fíggjarliga er uppskotið í góðari javnvág**

Kommunurnar skulu sambært galdandi lóg útvega tól og amboð til viðtaluna. Teirri uppgávuni sleppa kommunurnar undan í nýggju lógini. Landið skal nú útvega og viðlíkahalda tól og amboð.

Eftir verandi lóggávu hava kommunurnar bara havt skyldu til at veita hølir til sjálva kommunulæknaviðtaluna (og til heilsufrøðingar eftir lóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung). Men við hesum uppskotinum skulu kommunurnar útvega ókeypis høli til øll heilsustarvsfólk í heilsuøkinum. Kommunurnar  krevja í dag leigugjald frá sjúkrahúsverkinum til høli til økispsykiatriina. Við hesum uppskotinum fellur hendan leiguinntøka sostatt burtur.

Tá tað kemur til sjálvan raksturin, er sostatt talan um eitt uppskot, sum hevur við sær bæði fíggjarligar fyrimunir og vansar fyri kommunurnar. Samanlagt verður mett, at uppskotið javnvigar væl sum frá líður.

Viðvíkjandi íløgum fer helst at verða talan um ávísan meirkostnað. Kommunurnar skulu nú útvega fleiri hølir enn fyrr. Men mett verður ikki, at tørvurin í fermetrum verður so stórur í mun til núverandi kapasitet, at hetta verður nøkur týðandi byrða fyri kommunurnar. Talan er eisini um hølir til virksemi, ið fer at verða til stórt gagn fyri lokala borgaran, so hesa byrðu vilja kommunurnar gjarna átaka sær.

**Víðfevndar kunngerðarheimildir**
Samanumtikið kann sigast um lógaruppskotið, at tað gevur landsstýrisfólkinum rættiliga víðfevndar heimildir. Umframt heimild at skipa at kalla øll viðurskiftir í kunngerð, so kann landsstýrisfólkið eisini seta í verk 5-ára-royndarskipanir, ið kunnu víkja frá ásetingunum í lógini.

Lógaruppskotið kemur í gildi 1. januar 2025, men landsstýriskvinnan fær heimild at gera royndarskipan longu frá 1. november 2024. Hetta bendir sostatt á, at landsstýriskvinnan hevur skund við at seta royndarskipanir í verk, og at hesar longu eru fyrireikaðar. Tí skuldi tað verið upplagt at greitt meira ítøkiliga frá hesum ætlanum í viðmerkingunum til uppskotið.

**Fleiri heilsutænastur kring alt landið**
Sambært uppskotinum er ætlanin at veita fleiri heilsutænastur úti um landið, enn gjørt verður í dag. Sagt verður í uppskotinum, at ætlanin er, at fleiri av teimum kanningum og viðgerðum, sum í dag fara fram í sjúkrahúsverkinum, frameftir skulu fara fram úti um landið. Hesum taka kommunurnar fult undir við, tí ásannast má, at hetta gerst meira og meira tiltrongt.

Gongdin í samfelagnum er tann, at fleiri og fleiri fáa viðgerð í sjúkrahúsverkinum, og tá tey eru liðugt viðgjørd, gerast tey partur av heilsutænastuni í kommununum. At partur av virkseminum í sjúkrahúsverkinum nú verður flutt út í nærumhvørvið og nærri at kommunalu heilsutænastunum, letur upp fyri stórum møguleikum fyri samstarvi og menning, sum kann verða til stórt gagn fyri allar partar – ikki minst fyri borgaran.

Vegna
Kommunufelagið

Tórbjørn Jacobsen,
formaður

Eyðun Christiansen,
stjóri